# Jólastjørna

Avskorna oktaetrið kann verða brúkt sum grundskap at gera eina vakra jólastjørnu.

Fyrst verður avskorna oktaetrið klipt úr arkinum og límað saman (fyrimyndin er ímillum ørkini í pappírsgoymsluni). Avskorna oktaetrið hevur 14 flatar. 6 flatar eru fýrkantaðir og 8 eru sekskantaðir. Á fýrkantaðu flatarnar í avskorna oktaetrinum líma vit fýrkantaðar pyramidur og á sekskantaðu flatarnar sekskantaðar pyramidur eftir fyrimyndunum niðanfyri.

Sekskantaðu pyramidurnar eru her gjørdar nakað hægri enn tær fýrkantaðu. Fyri at lætta um límingina eru botnarnir á pyramidunum teknaðir eitt vet minni enn samsvarandi flatar í avskorna oktaetrinum.



Jólastjørna



Avskorið oktaetur





Prenta á pappír í hóskandi tjúgd. Klipp pyramidurnar úr arkinum.
Tak eina linjál og strika eftir strikunum við knívi. Boygg síðan um kantarnar og líma saman.
Pyramidurnar verða límaðar á samsvarandi flatar í avskorna oktaetrinum.





NÁM